VALGREINAR

Vit skulu hava læknaligar sergreinar í samband við sjúkrahúsið

Sverre Midjord
Valevni Javnaðarfloksins í Suðuroy

Eg fari ikki at leggja mær nakað til, sum eg lítið eigi í, men tað er eingin loyna, at eg havi verið virkin fyri, at vit byggja eitt sambýlið, við eini 12 íbúðum, á ogn kommununar í Trongisvági.

Fyrireikingar og tekningar verða nú gjørdar. Uppskotið og tær fyrstu fyrireikingarnar vórðu gjørdar av tí býráði, sum sat áðrenn hetta, sum nú er. Bergur Bærentsen var formaður í tí nevnd, sum stóð fyri ætlanini. Eg eri nú formaður í hesi fyrireikingarnevndini, og eg var eisini limur í fyrru nevndini, men vit komu ikki nóg langt tá, men nú halda vit málið er greitt, tí er tað tikið upp við tí álvara sum krevst, og tað verða eisini tikin onnur umráðir við.

Tað verður gjørdar fyrireikingar til eina viðgerðarstøð til fólk við serligum breki, hetta verður gjørt í tilknýti til okkara sjúkrahús. Viðgerðarstøðini kunnu t.d. verða í hølunum í eldrasambýlinum.

Eg havi tosað við Løgmann um hesar tankar, og hann er positivur fyri hesum, og vil leggja tað á Tvøroyri. Tað er bert at velja tey røttu umboðini, sum vilja uppá landsplan fremja hetta fyri okkum í Javnaðarflokkinum átrokandi mál.

Tey sum lósu samrøðuna, sum sosialurin hevði við Páll Vang fyrrverandi býráðsformann á Tvøroyri, sóu tørvin á einum slíkum stovni í Føroyum. Páll, sum er raktur av sjúku, sum hann onga hjálp kann fáa fyri, men má av landinum fyri at fáa viðgerð, og tað eru fleiri onnur, sum hava serviðgerð fyri neyðini, og tað er ein slíkan viðgerðarstovn, sum vit ætlað at leggja í samband við ta ætlaðu bygging.

Eitt annað mál sum eisini verður loyst, verða hølini hjá okkara pensiónsitum, tey vilja fáa síni egnu hølir har.

Jú her er nakað, sum krevur eina loysn, og sum eisini verður loyst, um eg fái ta landspolitisku ávirkan sum er neyðug.

Blokkurin er skorin við 366 milliónum

Edva Jacobsen
valevni Sambandsfloksins í Eysturoy

Tær 366 mill. kundu m.a. verið nýttar til:

- At gjalda uttanlandaskuld niður við
- byggja ellis- og røktarheim
- byggja sambýlir
- hækka fólkapensiónina
- byggja vardar íbúðir

Hesir møguleikar eru munandi skerdir av verandi samgongu.

Vel tryggleikan, vel vælferðina, vel Sambandsflokkin

Nýggi íbúðarpolitikkurin hjá javnaðarflokkinum:

5–7.000 kr. meira eftir at liva fyri um mánaðin

Kári Petersen og Bergur P. Dam
valevni javnaðarfloksins í Suðurstreymoy

Ung, sum vilja seta búgv, gomul, sum vilja flyta í minni íbúð, útisetar, ið vilja flyta heimaftur. Øll hesi fáa nógv betri møguleikar tá nýggi íbúðarpolitikkurin hjá Javnaðarflokkinum verður settur í verk.

Tann óforsvarligi figgjarpolitikkurin hjá landsstýrinum hevur gjørt, at sethúsaprísirnir eru trýstir upp í loft. Sethúsaprísirnir í miðstaðarøkinum eru hækkaðir 46% seinastu trý árini. Eini sethús uppá 120 fermetrar kosta nú 1,5 mió. kr. ella meir at keypa ella byggja.

Hjá nógvum ungum húskjum er hetta ikki møguligt. Eitt lán uppá 1,5 mió. kr. kostar 10.600 kr. um mánaðin. Útrokningin niðanfyri vísir, at ein familja við vanligari inntøku, og sum hevur tvey børn - eitt í barnagarði og eitt í vøggustovu - hevur ikki ráð til hetta. Onki verður eftir til aðrar útreiðslur so sum bil, ferðir, frítíðarlív, lestrarskuld osfr.

Sí roknistykki!

Tað, at landsstýrið ikki hevur stuðlað uppundir at økja útboðið av øðrum íbúðarmøguleikum hevur nú fort til stóran mangul uppá íbúðir. Íbúðarneyðin hevur samstundis trýst leiguprísirnar uppeftir, so nógv í dag leiga fyri 5-9 túsund um mánaðin. Tann dýra leigan førir sostatt til, at tey ikki kunnu savna sær eginpening til egnan bústað.

Stórur órættur verður framdur móti hesum fólkum, sum verða noydd at búgva í dýrum leigumálum. Tey hava hvørki møguleikan at keypa sítt egna ella leiga fyri eina sámuliga leigu.

Hendan bústaðarneyðin rakar serliga tey ungu, ið vilja flyta heimanífrá, men eisini tey eldru, ið vilja hava okkurt minni at fara í, og tey, ið koma heimaftur úr útlondum.

Javnaðarflokkurin ætlar at geva hesum bólkum møguleikan at seta búgv á annan hátt. Annaðhvørt at keypa eigaraíbúðir uppá t. d. 80 fermetrar fyri um 840 túsund kr. ella leiga eina íbúð uppá 80 fermetrar fyri 3.200 um mánaðin. Báðir hesir møguleikar føra til, at familjan fær munandi lægri húsaútreiðslur enn um tey byggja fyri 1,5 millión.

Keyp av íbúð uppá 80 fermetrar: Sparing 5.000 kr. um mánaðin.

Annar møguleikin er, at tey skula kunna keypa eina íbúð, sum fer at kosta um 840 túsund (10.500 kr. fyri hvønn fermetur). Harvið koma tey at gjalda 5.600 um mánaðin. Útrokningin vísir, at tey hvønn mánaða fara at hava 5.000 kr. meir eftir, um tey nýta hendan møguleikan, heldur enn at tey byggja fyri 1,5 mió. kr.

Tær familjur, sum gjalda 5.000 til 9.000 í leigu um mánaðin fáa ikki spart upp. Keypa tey í staðin eina íbúð fyri 840 túsund, so kann íbúðin nýtast at spara upp í. Ofta fáa ungar familjur ein størri plásstørv við tíðini, m. a. tí børnini vera størri. Verður íbúðin seld eftir 8-10 árum, hevur familjan uppspart sær ein eginpening uppá eina hálva mió.kr., sum kann nýtast um tey seinni velja at keypa sethús.

Leiga av íbúð uppá 80 fermetrar: Sparing 7.400 kr. um mánaðin.

Tey, ið heldur vilja búgva til leigu fyri ein sámuligan kostnað, skulu hava møguleika fyri at gera tað. Nøkur eru, sum ikki ynskja at binda seg til stórar fastar útreiðslur, tí tey vilja hava møguleikan at fara at arbeiða uttanlands í eitt tíðarskeið, onnur eru, sum koma heim úr útlondum og ikki hava avgjørt enn hvussu tey vilja búgva, og uppaftur onnur eru sum ikki ynskja at eiga tað, tey búgva í.

Velja tey at búgva til leigu í einari tílíkari íbúð, so verður mánaðarleigan 3.200 kr., og sostatt verða útreiðslurnar 7.400 kr. minni um mánaðin, enn um familjan hevði keypt hús fyri 1,5 mió. kr.

Nýggi íbúðarpolitikkur javnaðarfloksins.

Javnaðarflokkurin ætlar, um hann kemur í samgongu eftir valið, at broyta lógina, so íbúðarfeløg fáa rentustuðul, og somuleiðis at fremja lógarbroyting, so íbúðarfeløg fáa MVG-frítøku av byggikostnaði. Harvið vera leiguíbúðir munandi bíligari, og tað fer at loysa seg hjá stovnsligum íleggjarum at gera íløgur í leiguíbúðir.

Harumframt ætlar javnaðarflokkurin, frá almennari síðu, t. d. gjøgnum Húsalánsgrunnin at skipa so fyri, at eigara- og leiguíbúðir av hóskandi støddd, t.d. 80 og 100 fermetrar vera bygdar.

Úrslitið verður, sum nevnt omanfyri, at tað verður møguligt at búgva nógv bíligari enn nú, og hetta fer at hjálpa bæði ungdómum, sum ynskja at seta búgv, teim eldru sum vilja hava okkurt minni at fara í, og teimum, sum flyta heim úr útlondum.

www.karipetersen.com
www.javnadarflokkurin.fo

Tøk inntøka hjá barnafamilju, sum ávikavist keypir sethús, íbúð ella leiga íbúð

Inntøka hjá arbeiðara/starvsmanna familju:

	Inntøka arbeiðari	Inntøka starvsm/kv	Inntøka tils
Mánaðarinntøka	15.000	19.000	34.000
Skattur og tv. gjøld	4.918	7.240	12.157
Inntøka um má	**10.083**	**11.761**	**21.843**

Eftir av liva fyri hjá tveimum vaksnum og tveimum børnum.

	Keypari: Sethús: 120 fermetrar Kostnaður: 1,5 mió. Mánaðargj.: 10.600	Keypari: Íbúð: 80 fermetrar Kostnaður: 840 tús. Mánaðargj.: 5.600	Leigari: Íbúð: 80 fermetrar Mánaðarleiga: 3.200
Inntøka eftir skatt	21.843	21.843	21.843
Lánsgjald	10.600	5.600	3.200
Ansing	3.750	3.750	3.750
Matur, klæði,el, hiti, út- og sjónvarp	6.000	6.000	6.000
Eftir um mánaðin	**1.493**	**6.493**	**8.893**

VIÐMERKINGAR

Burtur við bíðilistunum

Mikkjal Sørensen
valevni Javnaðarfloksins í Suðuroy

Javnaðarflokkurin hevur heilsuverk og og heilsupolitikk ovarliga á breddanum og flokkurin vil tryggja neyðugu játtanina.

Javnaðarflokkurin góðtekur ikki, at deildir verða afturlatnar í fleiri mánaðir á hvørjum ári av tørvandi játtan, eins og Javnaðarflokkurin heldur ikki kann góðtaka bíðilistar til sjúkraviðgerð. Trupulleikin við tørvandi læknamanningini á smáu sjúkrahúsunum skal loysast, eins og flokkurin vil hava settan serlækna til eldrasjúkur og ein serlækna í barnapsykiatri.

Heilsuverkið hevur nýmótans tøkni, t.d. scannarar. Hesir áttu at verið hent amboð til sjúkuviðgerð, áðrenn sjúklingur skal viðari í skipanini. Men í dag eru dømi um, at sjúklingar bíða 2 og 3 mánaðir eftir at sleppa framat hesum tólum. Hetta kann ikki góðtakast og bíðilistarnir skulu burtur.

Í sjúkrahúsverkinum skal tørvurin hjá sjúklinginum setast í hásæti. Vit seta sum aðalmál, at øll viðgerð, sum vit bjóða her á landi, skal vera á eins høgum stigi, sum tann frægasta í okkara grannalondum.

Vit vilja tryggja sjúkrahúsverkinum neyðugu játtanina, og vit vilja tryggja heilsuverkinum, at starvsfólkini fáa góðar umstøður á arbeiðsplássinum umframt møguleikar til at dagføra sín førleika.

Javnaðarflokkurin vil taka ítøkilig stig at betra fólkaheilsuna. Tí skal primera heilsutænastan styrkjast og vera eins góð kring alt landið.

Krevji at fáa umbering

Tórbjørn Jacobsen
fólkatingsmaður

Góði Jan Müller!

Tann 6. apríl hevði ein av blaðmonnum tygara, Edvard Joensen, eina grein undir heitinum "Fullveldismenn misnýta Stoltenberg" í Sosialinum.

Hetta var ein samrøða við Thorvald Stoltenbeg, sum avsannaði eitt tíðindaskriv frá Norðuratlantsbólkinum á fólkatingi um, at Stoltenberg hevði játtað at arbeiða fyri Norðuratlantsbólkin.

Tann 8. apríl sendi Norðuratlantsbólkurin so út eina váttan fyri, at Stoltenberg hevði játtað at arbeiða fyri bólkin.

Men Edvard Joensen arbeiddi kortini, vegna Sosialin, viðari við málinum. Hann ringdi til mín tann 10. apríl, bað um at fáa svar uppá ymisk viðurskifti, og vit høvdu eina drúgva samrøðu.

Men eg havi – eins og nógvir aðrir politikarar sum ikki hoyra til Javnaðarflokkin – sera vánaligar royndir av tí politiska journalistikkinum hjá Sosialinum. Endamálið tykist ofta at vera politisk agitatión heldur enn upplýsing. (Smb. t.d. yvirskriftina "Fullveldismenn misnýta Stoltenberg"). Tveir fyrrverandi blaðmenn á blaðnum hava jú eisini alment boðað frá, at tann politiski journalistikkurin á Sosialinum verður beinleiðis stýrdur av Føroya Javnaðarflokki.

Tí ringdi eg til Edvard Joensen eftir at samrøðan var gjørd, og bað um loyvi at sleppa at leisa greinina sum kom burturúr, áðrenn hon varð prentað. Hetta lovaði blaðmaðurin, at eg skuldi sleppa.

Klokkan 11.13 føroyska tíð kom greinin so inn á T-post skipanina á Christiansborg. Men tað bar ikki til at lata filin upp, og skrivari mín ringdi tí til blaðmannin, og bað hann senda hana umaftur.

Klokkan 12.49 føroyska tíð kom greinin fyri aðru ferð inn á mína teldu. Orsakað av at eg skuldi til Føroya sama dag, var eg á veg út í floghavnina í Kastrup um hetta mundi. Skrivarin las tí partar av greinini fyri mær í telefonini – og eg gjørdist skjótt greiður um, at endamálið við journalistikkinum aftur hesaferð var politiskt.

Eg bað tí skrivaran ringja til Edvard og biðja hann steðga við greinini til vit høvdu tosað saman aftur.

Tað gjørdi hann beinanvegin – og hann sendi eisini blaðmanninum soljóðandi T-post: "Hey Edvard. Eg havi lisið greinina fyri Tobba, sum er á veg út í Kastrup í taxabili. Hann segði, at hann kann ikki góðtaka tað, hann er endurgivin fyri, í verandi líki. Hann vendir aftur til tín í morginári. Heilsan, Sjúrður."

Hesin teldupostur var sendur kl. 13.16 føroyska tíð. T.e. 27 minuttur eftir at blaðmaðurin hevði sent greinina til mín til góðkenningar.

Hóast hetta – og hóast tað lyfti hann gav mær tá samrøðan varð gjørd – læt hann greinina prenta uttan góðkenning. Eftir at eg var komin til Føroya ringdi blaðmaðurin og boðaði mær turrisliga frá, at greinin var prentað.

Eftir at hava spurt meg fyri um evstamark á Sosialinum eri eg komin eftir, at greinin enntá helst var send til prentingar áðrenn kl. 12.49, tá hon varð send mær til góðkenningar.

Kortini skrivar blaðmaður tygara, eftir at eg hevði gjørt vart við hetta álitisbrot, soleiðis í eini viðmerking til málið tann 16. apríl: "Alt, sum fór fram í tí málinum, var júst sum avtalað okkara millum."

Fyrst brýtur blaðmaður tygara altso eina klokkuklára avtalu. Og síðani trínur hann alment fram, og verjir sítt avtalubrot við at siga ósatt um málið.

Sama dag – 16. apríl – skrivar tú eina oddagrein um málið, har tú ikki á nakran hátt tekur støðu ímóti framferð blaðmannsins. Í staðin kastar tú, við støði í teirri ikki góðkendu greinini, undirritaða alt ilt fyri. Og so sigur tú – eisini við støði í teirri ikki góðkendu greinini – at "tað er ikki so løgið, um fólk hereftir fara at aftra seg fyri at tosa við Norðuratlantsbólkin".

Tygum venda við øðrum orðum málinum á høvdið. Tað er Sosialurin, sum hevur brotið eina avtalu. Tað er Sosialin, sum fólk eftir hetta mugu aftra seg fyri at tosa við (um tey ikki aftraðu seg áðrenn).

Blaðmansins og blaðsins framferð í hesum máli er í strið við alla siðvenju innan tíðindaflutning, harra blaðstjóri. Tað er púra greitt, at blaðið í hesum máli ikki hevur virkað fyri upplýsing, men einans fyri at skaða ein politiskan mótstøðumann hjá Føroya Javnaðarflokki. Til tess at røkka hesum máli er ein avtala brotin, og sannleikin lagdur til viks.

Hesa framferð kann eg als ikki góðtaka, harra blaðstjóri. Eg kreyji tí at fáa eina almenna umbering frá tær á sjónligum stað í fyrstkomandi útgávu av Sosialinum.

Fái eg ikki tað, má eg taka tað sum eina greiða almenna fráboðan frá leiðsluni á Sosialinum um, at tað er á hendan hátt, Sosialurin vil umsita ta stóru ábyrgd sum tað er, at standa fyri tíðindaflutningi í føroyska samfelagnum.

Um so er, er hetta sjálvsagt eitt mál fyri blaðmannafelagið.

Eg havi tí sent Føroya Blaðmannafelag avrit av hesum brævi, og fari at heita á felagið um at taka málið upp, um tygum ikki geva mær eina treytaleysa umbering fyri blaðsins framferð.

Av tí at hetta má metast at vera eitt mál sum hevur almennan áhuga, er brævið eisini sent fjølmiðlunum sum tíðindaskriv.

Allir flokkar vilja í samgongu við Javnaðarflokkinum!

Birgir Mohr
valevni Javnaðarfloksins á Sandi

Kollsilgda fullveldissamgongan einki mál.

Fullveldis-royndartiltakið hjá fráfarandi samgongu er kollsilgt. Hendan royndin at loysa Føroyar úr ríkisfelagsskapinum hevur kostað okkum føroyingum bæði nógvan pening, vælvild og dýra tíð.

Stóru andstøðuflokkarnir høvdu rætt, tí tjóðarfrælsi á pappírinum kann als ikki á nakran hátt tryggja okkum føroyingar. Fullveldisætlanin og loysing úr ríkisfelagsskapinum tekur ikki fyrilit fyri okkara lívsfrælsi og okkara lívsvirði.

At skerja blokkin og siga, so eru vit meira fræls í Føroyum, tað er ikki haldbært - tað er faktiskt heilt skeivt, tí ídag er ein við ongum peningi bert frælsur úti í "jungluni", har peningur ikki verður nýttur.

Tí hevur henda fullveldisroyndin bert givið okkum færri rættindir, minni inntøku, ótryggleika og størri óvissu. Og tí taka føroyingar ikki undir við hesi ætlan, har bert tey sterkastu í samfelagnum koma at klára seg væl, uppá bekostning av fjøldini. Besta prógvið fyri hesum var, tá í løgtings- og landstýrismenn skundaðu sær við at tryggja seg sjálvar, við stórari lønar- og eftirlønarhækking, men vildu ikki fólkinum tað sama.

Vit skuldu fáa fólkaatkvøðu um ríkisrættarliga politikkin, men tað fingu vit ikki, tí tey ráðandi tordu ikki.

Vit skuldi fáa ein búskapargrunn til oljupeningin, men tað fingu vit ikki, og enn vita vit ikki, um nakar oljupeningur verður.

Vit skuldu fáa ein pensiónsreform fyri allar føroyingar, men tað fingu vit ikki vegna klandur í samgonguni. Bert egna lønarhækkan og eftirløn kundu tey semjast um, og tað gav met av stríði og verkføllum á arbeiðsmarknaðinum.

Vit skuldu yvirtaka flogvøllin í Vágum, men tá ástóð, so tordu tey ikki í samgonguni. Vit ávaraðu tey, men tey vildu ikki lurta. Vit skuldu fáa nýggjar landbúnaðarlógir, men tað kundi samgongan als ikki semjast um. Vit skuldu fáa nýggja vanlukkutryggingarlóg, hon kom ikki. Tann gamla er langt síðani vorðin ótíðarhóskandi.

Ídag - eftir at fullveldisskútan er partvíst sindra og partvíst kollsilgd - eru Heimastýrislógin og Javnaðarflokkurin vorðin loysnin. Allir flokkar siga seg kunna, og vilja, samstarva við Javnaðarflokkin. Tað er ikki at undrast yvir, tí Javnaðarflokkurin hevur bestu boðini uppá loysn av óloystu trupuleikunum í Føroyum ídag.

Javnaðarflokkurin hevur alla tíðina hildið uppá sítt uppskot til eina sjálvstýrislóg, eina sjálvstýris-avtalu við Danmark. Júst tí at vit vilja hava hinar flokkarnar við, er hettar eitt uppskot - ikki ein liðug lóg.

Ein slík avtala greinar vegin fram til sjálvstýri og sjálvbjargni, uttan at vit missa nøkur rættindir, uttan at vit skullu skerja okkara vælferð, men sjálvi kunnu leggja tað so til rættis, at ferðin hóskar til okkara fakligu orku og figgjarligu møguleikar. Hetta skal henda í fullari semju við hinar partarnar av ríkisfelagsskapinum, sum framvegis verður ein karmur um trý sjálvstýrandi fólk: føroyingar, grønlendingar og danir.

Hettar er vegurin til loysn á ríkisrættarliga málinum. Helst áttu allir politiskir flokkar í komandi Løgtinginum at tikið undir við hesum - bæði samgonguflokkar og andstøðuflokkar. Málið er ov stórt og týdningarmikið fyri okkum, at berur partapolitikkur skal ráða á hesum øki.

Javnaðarflokkurin vil samstarv at fremja loysningar - fremja vilja fólksins.

Fólkið fyrst ! Veljið JAVNAÐARFLOKKIN.